**Müllersættin:**

# Ørur maður í býnum í 1910

**Amalia Joensen og hennara synir hava dugað væl at skriva og hava verið dúgligir brævskrivarar. Tí ber til at lýsa søguna um Villa hjá Grønlands-Johan, sum gjørdist amerikanskur flotaovasti**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**6. partur**

Í seinasta parti endaðu vit brævskrivingina til Poul Müller, sum doyði í 1901. Tá var eingin ábending um, at Amalia og Johan ikki ætlaðu at blíva verandi í Grønlandi nakað væl afturat. Men longu í 1902 eru tey aftur í Føroyum. Eyguni eru farin at bila hjá Johan, og kanska heilsan eisini, tí longu í 1907 er Johan deyður.

Tá fór Amalia at fáa sær privatskúla, sum nógvir vóru í Havn seinast í 19. øld og fyrrapartin í 20.øld.

Amalia var longu í 1887 farin at hava privatskúla, men hon gavst í 1890, tá ið hon fór til Grønlands.

Men eftir, at maðurin er deyður, fer Amalia aftur undir at hava privatskúla. Hetta var í Bauers húsi í Rættará ella Christines Minde, sum tey eisini kallaðust. Her búði hon, og her hevði hon skúla til 1934, tá hon gavst. Beiggin Poul hevði arvað húsini frá foreldrunum, og Amalia arvaði húsini frá Poul.

Tað er óvist, hvussu nógvar næmingar Amalia hevði, tí eingir næmingalistar eru til skjals. Á skúlamynd frá 1921 eru 27 børn.

Táið hon gavst at undirvísa í 1934 var Amalia 68 ár. Tá var nýggi katolikkaskúlin komin. Hann dró so nógvar næmingar, at Amalia hevði ongar eftir.

Petur Háberg skrivaði í Hugbirtingum um privatskúlar og eisini um tann hjá "fru Joensen", sum Amalia varð kallað.

Hann skrivar, at í garðinum var ein stórur steinur, sum menn meintu var íbygdur.

Petur sigur frá einum gomlum næmingi, at nakrar gentur vóru so fínar, tíat tær dugdu at rokna brøk og sótu við eitt borð fyri seg. Men at hava børn í ymiskum aldursbólkum og búningarstøði inni í senn, tað kann ikki hava verið so lætt, sjálvt um tað hevur verið ein hjálp, at ymisk hold møttu til ymiskar tíðir.

Einaferð var ein drongur, sum hevði ein fjórðing at ganga til hús, eftirsettur, tíat hann ikki hevði dugað nóg væl. Hann gramdi seg um, at hann var so svangur. "Íðan góði," skal frú Joensen hava sagt, "so skalt tú eta saman við okkum. Vit hava grunningshøvd í dag."

Hon hevði eina jarnlineal, sum hon stakk niður eftir ryggskinninum á næmingum, ið vóru slignir í herunum fyri at fáa teir at rætta seg upp. "Linealin var so køld fyrsta dagin, men hon ornaði so við og við," tók onkur gamal næmingur til.

Petur minntist sjálvur til, at frú Joensen hevði avtalað við bróðursonin bóndan Poul Müller, son Søren, at hann skuldi siga teimum frá, tá ið hann slepti neytunum út um várið. Hetta var ein sonn fragd hjá børnunum at síggja, ikki minst hvussu lystiliga kálvarnir spældu.



*Amalia Joensen, sum hevði privatskúla fyri tey "fínu"*



*Næmingar hjá frú Joensen umleið 1921*

## Villi fer burtur

Vilhelm var elstur av systkjunum f. í 1891. Hann fer út at sigla í 1907, og í verunleikanum er tað sera lítið fólk vistu um hann, fyrr enn hann kom heim á eina stutta vitjan í 1943. Tað vit vita nú kom ikki framm fyrr enn Vilhelm doyði í 1948. Tá komu undan kavi brøv, sum mamma og brøður hansara skriva til hansara. Tey siga nakað um gongdina fyrstu árini hjá Vilhelm úti í heimi.

Okkurt er komið fram í brøvum frá mammubeiggjanum Hans Christian Müller í USA til ættina heima í Føroyum. Hetta verður komið aftur til í komandi parti.

Ikki minst eru hesi brøv áhugaverd í síni lýsing av lívinum í Havn fyri um 100 ár síðani.

## Konfirmatiónsgávur í 1909

Fyrsta endurgivna brævið til Vilhelm er frá beiggjanum Guttorm, har hann hevur áhugaverda frásøgn um sínar konfirmatiónsgávur.

*Thorshavn 12.9.1909*

Kære Ville
Jeg er blevet konfirmeret. Jeg fik 30 Kr. fra Onkel Søren, 25 fra Onkel Rasmus, 20 Kroner fra Onkel Jens, 5 kroner fra Frk. Kjelnæs, 4 Kr fra Hanne (helst arbeiðskonan hjá Müller) og 2 Kr. fra Rasmus Effersøe, altsaa i alt 81 Kr.

Fra Mor fik jeg Fars Sølvur og Fars Sølvkæde, fra fru Mohr (Margrethu, konu Jens) fik jeg et Skrivestel og fra Andrass Samuelsen et Brevkort Album og et fra Just Jacobsen. Desuden 11 forskellige Bøger, 29 Gratulationskort og 2 Telefontelegrammer. Jeg havde Matrostøj, naturligvis med lange Bukser, til Konfirmationen. Senere skal du faa et Billede af mig.

Jeg længes efter at høre fra dig. Jacob Øster skal op paa Sanatoriet. Vi har meget at gøre nu i Handelsforeningen, fordi Onkel Jens (Olsen) er i Kjøbenhavn, for han har ondt i Øret. Jeg gaar over i Handelsforeningen Kl. 8 om Morgenen og gaar Kl. 11 til Frokost. Igen i Handelsforeningen Kl. 12, Kl. 2 til Middag, og Kl 3 ind igen, kl. 5 til Eftermiddagste, Kl. 6 ind igen, og saa bliver jeg til de lukker Kl. 8½.

Send mig endelig nogen Brevkort, for jeg samler, og jeg ejer en masse. Jeg fik ingen Brevkort fra dig, da du var i Australien.

Bankdirektøren (C. Christensen) skal rejse fra Færøerne for Alvor. En Islænder (G.M. Havsten) skal være 1ste Bankdirektør og Steingrim Finsen skal være 2den Bankdirektør.